planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

Myndir: Jens Kristian Vang

# Heimsstjørnurnar



Eingin kundi ivast í hví hesir Nashville tónleikarar teljast í millum heimsins bestu, tá ið teir leygarkvøldið framførdu fyri yvir 2000 føroyingum. Kortini komu teirra evnir ikki reiðiliga til sín rætt í sitikonsertini á Hálsi

Loksins kom dagurin, har tann nógv umrødda Nashvík konsertin varð hildin. Við fleiri av heimsins bestu tónleikarum bjóðaði Høllin á Hálsi yvir 2000 føroyingum til eina tí størstu konsertina í Føroyum nakrantíð. Umframt tær sjey countrylegendirnar, vóru eisini 14 føroyskir sangarar, ið ein eftir ein trinu á pall við sínum egnu løgum, har fleiri country landaplágur vóru at hoyra.

**Fantastiskir tónleikarar**
Konsertin var býtt í tríggjar ymiskar partar. Í hvørjum parti vóru ymiskir føroyskir sangarar á palli, har tey sungu og spældu við Nashville tónleikarunum, ið eisini framførdu tvey løg

